# Hví skulu nakrir pensjonistar gjalda fyri sína vaccinu

ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK



Nakrir pensjonistar – veit ikki hvussu nógvir – hava longu goldið fyri sína vaccinatión móti influensu. Spurningurin er tí, hví nakrir pensjonistar skulu gjalda fyri vaccinatión móti influensu, meðan aðrir fáa hetta ókeypis? Svarið er: tí at landsstýrismaðurin hevur sovið í tímanum!

Og ikki fyrr enn mánamorgunin 8. oktober var tað onkur, sum vakti landsstýrismannin. Hendan morgunin sigur ein lækni í Útvarpi Føroya, at skal vaccinatiónin av pensjonistum nytta nakað, so mugu tey vaccinerast antin í september ella oktober.

Hov! Hvat er nú til ráða at taka, her hevur hann lovað øllum pensjonistum ókeypis vaccinatión móti influensu, og nú sigur fakkunnleikin, at hásesongin fyri hesi vaccinu er við at verða úti. Samstundis sum landsstýrismðurin veit, at hann hvørki hevur materiellu heimildina ella pengarnar til hetta lovaða lyftið!

Men søgan byrjar ikki her:

Fyri einum ári síðani bað Hans Pauli Strøm um pengar til pensjonistar, sum vildu vaccinera seg móti influensu. Hetta var í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2007, sum var til viðgerðar í løgtinginum í fjørheyst. Tá uppskotið var í fíggjarnevndini tók nevndin uppskotna peningin av, tí materiella heimildin ikki var komin upp á pláss. Tvs at landsstýrismaðurin hevur havt eitt heilt ár at fyrireika materiellu heimildina, sum er at orða eina kunngerð ella lógaruppskot, sum loyvir ókeypis vaccinatión til pensjonistar.

Alt várið gekk, og har kom hvørki lóg ella kunngerð frá Almanna og heilsumálaráðnum, hóast fleiri áheitanir og áminningar frá løgtingsfólkum.

So byrjar nýggj tingseta á ólavsøku, og allur august mánaður gongur og september við, og har kemur framvegis onki uppskot frá AHM, um hvørki fría vaccinatión ella nakað annað. Hóast AHM og landsstýrismaðurin nú fyri skjótt ári síðani blivu vitandi um, at koma tey ikki við materiellu heimildini, so kunnu tey heldur ikki fáa pengarnar til fría vaccinatión fyri fíggjarárið 2007.

Hóast landsstýrismaðurin hevur fingið at vita, at tað er materiella heimildin, sum manglar skal hann fáa pengar, so kemur hann kortini við enn eini umbøn um pengar. Hesaferð á eini eygafíggjarlóg, sum varð løgd fyri tingið síðst í september, og sum kann verða ein heilan mánað í nevnd, áðrenn hon kemur til 2. og 3. viðgerð. Nakað eftir hesa umbøn um pengar á eykafíggjarlógini, verður eitt lógaruppskot borið niðan í løgtingið í oktober, og sum skal verða tann materiella heimildin. Men eisini hetta uppskotið eigur at hava ein mánað, frá tí tað verður borið í tingið, til tað er samtykt. Tvs, at hetta uppskotið hevði ikki verið samtykt fyrr enn einaferð í november.

Men so er tað hesin vælsignaði læknin, (og eg meini vælsignaði), sum vakti landsstýrismannin mánamorgunin, - takk skal hann hava fyri tað. Veit tó ikki, um læknin visti, at hann fungeraði sum vekjaraklokka hendan morgunin. Hann fortaldi nemliga Føroya fólki, at skulu tey vaccinerast mugu tey gera tað í hesum mánaði, sum vit eru í nú, um tey ikki høvdu gjørt tað í september.

Hesi orðini fingu veruliga politiska maskinaríið í gongd úti í AHM. Tað gongur ein dagur 9. oktober, so er umbøn í fíggjarnevndini frá Hans Paula Strøm via fíggjarnevndarskjal, um pengar, sum skulu brúkast til ókeypis vaccinatión. Og hetta hendir meðan fíggjarnevndin arbeiðir við eini eykafíggjarlóg, har sami maður biður um somu pengar.

Fíggjarnevndarskjal eigur ikki at gangast á møti, uttan so, at talan er um nakað, sum er bráðfeingis og bráddliga íkomið. "Bráðfeingis" er tað nú blivið, og tað verður nokk alt fyrr ella seinni, um tað bara verður bíðað nóg leingi. Men "bráddliga íkomið" er tað ikki. Landsstýrismaðurin hevur havt eitt heilt ár at fyrireika málið, hvørt kunngerð í vavið telur 16 orð. (sí kunngerðarblaðið)

Men spurningurin er tí nú, hvat hann ger við teir pensjonistar, sum longu hava fingið sína vaccinu og goldið fyri hana úr egnum lumma.

Kunngerðin er dagfest 8. oktober (sama dag, sum læknin var í útvarpinum um morgunin). Og kunngjørd einaferð í somu viku.

# Meðan vit bíða eftir fíggjarnevndini

JENIS AV RANA



**ein áheitan frá Miðflokkinum á fíggjarnevndina um at raðfesta ríkidømið rætt**

Fíggjarlógaruppskotið fyri komandi ár varð lagt fyri Løgtingið uttan ta tálman, sum sambandsleiðslan ætlaði- uttan iva alt gott um tað. Ístaðin vann uppskot fólka- og javnaðarfloksins, eitt uppskot uttan tær stóru visiónirnar.

Formaður fíggjarnevndarinnar hevur gjørt greitt, at tá uppskotið kemur úr aftur nevndini, verður tað ikki at kenna aftur. Fyri Miðflokkin hevði hetta kenst ræðandi, um støða okkara ikki var hon, at vit í dag eiga eitt umboð í fíggjarnevndini. Eitt umboð, sum kann fylgja við, og vónandi ávirka fíggjarnevndarlimir at minnast týdningin av rættari raðfesting.

Inntøkuvøkstur uppá knappa milliard.

Hyggja vit at inntøkuvøkstrinum í árunum 2004 til 2007 hevur hesin verið 840 mill. , og taka vit 2008 við, so táttar vøksturin í eina milliard. Hugsa tær, at vanligi føringurin, gjøgnum skatt og avgjald av tí, hann hevur keypt, komandi ár fer at rinda útvið 1 mia. meira í landskassan, enn hann rindaði fyri 4 árum síðani. Fantastiskt. Men sæst hetta aftur í samfelagnum??? Uttan iva eru nøkur í tí hepnu støðu at kunna svara ja. Men munnu ikki flestu kenna nøkur, ið sita ivandi og hyggja rundan um seg, tá tey hoyra hesi tøl. Hava ilt við at kennast við hetta meirvirðið, sum jú verður tikið inn í landskassan, fyri at verða býtt útaftur, har tørvurin er størstur.

Hvar síggjast hesar eyka inntøkur aftur?

Síggjast tær aftur hjá barnafamiljunum, sum dagliga stríðast fyri at fáa dagliga dagin at hanga saman fíggjarliga?

Síggjast tær aftur hjá teim sjúku sum minkan í bíðitíðum til sjúkrahúsviðgerðir?

Síggja børnini tær aftur gjøgnum fyribyrgjandi kanningar hjá skúlalæknum ella hækkan av heilsusystratænastuni á tað støði, grannalond okkara bjóða sínum?

Sígjast tær aftur sum ein lætti í bústaðartrupulleikum teirra, ið av fysiskum ella sálarligum ávum eru tarnaði?

Merkjast tær hjá teim sálarliga sjúku, sum enn noyðast at búgva á sjúkrahúsdeildum?

Merkjast tær sum skattalættar hjá teimum láglønttu?

Og vit kundu hildi á at spurt!

Hugsið m.a. um hesi, góðu fíggjarnevndarlimir!

Tað er eingin kunstur at taka ímóti skatta- og avgjaldsmilliónum, tá byrður er góður. So er um allan tann partin av heiminum, vit samskifta við, í løtuni. Kynstrið, tað, ið vísir dugin í okkum politikkarum, er at síggja hann, hana og tey, sum av ymiskum ávum treingjast og rætta teimum hond. At senda teimum, sum ikki eru á ovastu rókum, men sum stríðast fyri ikki at detta útav niðastu rók, tann partin av fíggjarvøkstrinum, sum kann fáa hesi at fóta sær aftur.

Vit í Miðflokkinum vóna og síggja fram til at fáa eitt fíggjarlógaruppskot aftur úr fíggjarnevndini, har ríkdømið, sum Skaparin so ríkiliga unnir okkum, kenst raðfest frá hjartanum.

# Nýggjárskonsertin og kvinnurnar

KAI VÁGFJALL



Nú eru bert tríggir mánaðir, til árliga nýggjárskonsertin verður framførd. Havi altíð roynt at vissa mær atgongumerki til hesa megnar konsert.

Tað sum undrar meg stórliga er, at tað altíð eru menn, sum eru frásøgumenn til hesar konsertir, ja summir hava verið frásøgumenn fleiri ferðir. Eg spyrji tí: eru tað ongar kvinnur í landinum, sum kunnu brúkast sum frásøgukvinnur??

Í hesum døgum verður nógv skrivað og tosað um Demokratia, at fáa fleiri kvinnur við í politikk, um javnstøðu o.s.fr., so hví ikki hava eina frásøgukvinnu, til næstu nýggjárskonsert?

# Føroyski Eftirskúlin í Hvalba

SVERRE MIDJORD



Komandi ár hevur undirritaði verið virkin í politikki í 50 ár, og øll hesi ár hevur eitt av mínum hjartamálum verið ungdómurin. Ungdómurin er okkara framtíð og íløgur í ungdómin kunnu ikki virðismetast nóg høgt. Tað verði seg borðtennis, fótbóltur, kapproður, flogbóltur ella annar ítróttur, tí eg veit av egnum royndum hvussi stóran týdning tað hevur fyri okkara ungdóm at tey verða stuðla og ment til blómandi virksemi.

Í nógv Harrans ár hevur stórt tal av føroyskum næmingum leitað sær á danskar eftirskúlar, tí at vit her heima ikki hava slík tilboð til teirra. Til tess Føroyar ikki skulu gerast eftirbátur á skúlaøkinum samtykti Føroya Løgting í ár 2000 eina føroyska eftirskúlalóg. Líka síðan hava fyrireikingar verði gjørdar at seta á stovn nýtímans eftirskúla í Hvalba, og nú bæði álit og útgreiningar eru latnar Føroya Landsstýri er málið búgvið til politska støðutakan.

Undirritaði fegnast um eftirskúlaverkætlanina, sum eg haldi er eitt megnar tiltak til gagns fyri føroyskan ungdóm. Serliga fegnist eg um, at bæði kommunufeløgini taka undir við verkætlanini og at nevndin fyri eftirskúlan hevur lagt so stóran dent á samstarv við teir bestu eftirskúlarnir í Danmark, tí hetta er borgan fyri at vit fáa ein eftirskúla á høgum altjóða støði. Eg stuðli eftirskúlanum av fullum huga og vil virka fyri at hann kemur á komandi fíggjarlóg, so vit kunnu byrja uppá eftirskúlan sum skjótast.